# Royn rúmdarkliva hjá Idé Møblum á Hálsi

**Hvør vil ikki sova ein tíma longri hvørja nátt uttan at brúka meira tíð upp á tað?**

RÚMDARKLIVI
*Tíðiindaskriv*

Tað ljóðar sum ein dreymur, men tað er kortini hetta, sum Tempur-madrassan hevur at bjóða. Hendan madrassin, ið verður nevnd heimsins besta, er soleiðis gjørd, at tú vendir tær nógv minni um náttina, og tískil hevur tú fingið munandi betri hvíld, tá ið tú vaknar aftur um morgunin.

Idé møblar hava tikið Tempur til sín. Higartil hevur smásølan hjá Zacharis Thomassen í Kollafirði verið umboð í Føroyum, men Tempur ynskti at gerast meiri sjónligt og valdi ársins handil at umboða seg. Zacharis Thomassen heldur kortini fram at selja Tempur í tøttum samstarvi við Idé møblar.

Um vikuskiftið kann madrassin roynast hjá Idé møblum á Hálsi. Har vera serligir serfrøðingar til staðar, ið greiða frá tøkni og nýtslu, og tú kanst eisini royna serliga rúmdarklivan, ið er settur upp.

Tempur madrassin byggir nevniliga á rúmdartøkni. Tað snýr seg um skúm. Tilfarið í Tempur varð upprunaliga uppfunnið og ment í 1970-unum á NASA Research Center í Kaliforniu fyri at bøta um sitieginleikarnar í rúmdarførum. Við at nýta hetta serliga trýstumlættandi evnið í rúmdarbúnunum sluppu astronautarnir eisini undan snuddum, tá ið teir vóru vektleysir í rumdarfarinum.

Tá ið tøknin gjørdi tað gjørligt at framleiða smærri eindir, varð nýtslan í nøkur ár avmarkað til medisinskar pútur og madrassir til fyribyrging av liggisárum. Aftaná umfatandi menning á verksmiðjuni hjá Tempur World í Danmark (Dan-Foam ApS) varð slóðin ruddað fyri at nýta tøknina til privata nýtslu umframt til sjúkrahús o.a. um allan heimin.

Tempur hevur fullkomiliga broytt gomlu áskoðanina um, at ein madrassa skal vera føst - ella enntá hørð. Tá ið tú leggur teg í eina Tempur-madrassu følist hon fyrst rættiliga føst, men kropshitin og vektin bloytir skjótt tilfarið, sum formar seg eftir kroppinum og gevur eina kenslu av vektloysi. Sostatt leggur kroppurin seg í sína náttúrligu legu, tá ið tú svevur, og tað økir munandi um lívsgóðskuna.

Tempur legði allan heimin fyri sínar føtur og setti ein nýggjan standard fyri sunnum svøvni. Ryggserfrøðingar og brúkarar um allan heimin eru ovfarin av tí ávirkan, sum Tempur hevur á svøvngóðsku og veikar ryggir. Hjá Idé møblum um vikuskiftið kunnu fólk sjálv uppliva og hoyra hví. Um tey altso ikki eru sovnað áðrenn.

# Ein harður stoytur



*Vørubilurin hjá Føroya Bjór slongdist tvørtur um vegin, gongubreyt og upp um autoverjuna og niður av vegnum av stoytinum, tá ein bilur, sum kom eftir Velbastaðvegnum koyrdi út fyri hann. Annar bilurin helt ikki víkiskylduna, og hon hevur eftir øllum at døma havt ov nógva ferð*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tað sá ógvusligt út, tá tveir bilar stoyttu saman á vegamótinum, Marknagilsvegur/Velbastaðvegur**

FERÐSLUÓHAPP
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Ein persónbilur, sum kom av Velbastaðvegnum koyrdi út fyri ein vørubil hjá Føroya Bjór sum kom oman eftir Marknagilsvegnum.

Stoyturin var sera harður, tí hvørgin bilførarin fekk stundir at bremsa. Bilførarin í vørubilinum royndi at stýra undan, men stoyturin var kortini so harður, at bilurin slongdist upp um gongubreytina og autoverjuna og niður av vegnum niðanfyri.

Bilurin, sum kom av Velbastaðvegnum helt ikki víkiskylduna, og vørubilurin hjá Føroya Bjór hevur eftir øllum sólarmerkjum at døma havt ov nógva ferð eftir umstøðunum.

Fyri at koyra út fyri treytaleysa víkiskyldu er dómurin eirindaleysur: Tú skalt til nýggja teoriroynd hjá Bileftirlitinum og fært ein treytaðan dóm.

# Landssjúkrahúsið tekur nýggja bygningin í nýtslu

**Fyrsta stóra útbyggingin av Landssjúkrahúsinum síðan sekstiárini er nú um at koma á mál. Í komandi viku verður fyrsti sjúklingurin skurðviðgjørdur á nýggju skurðgongini**

SJÚKRAHÚS
*Tíðindaskriv*

Landssjúkrahúsið fer í næstum at taka nýggja sjúkrahúsbygningin í nýtslu. Bygningurin fer at hýsa fimm deildum, og sum tann fyrsta verður nýggja skurðgongin tikin í nýtslu í komandi viku, tá tann fyrsti sjúklingurin verður lagdur undir skurð í einari av teimum seks nýggju skurðstovunum á 2. hædd í nýggja bygninginum.



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsu- og almannamálum saman við Poul Geert Hansen, sjúkrahúsleiðara framman fyri nýggja bygningin hjá Landssjúkrahúsinum*

Nýggj seingjardeild, rannsóknarstova og medisinsk kanningar- og viðgerðardeild verða allar tiknar í nýtslu komandi mánaðin, og sum tann seinasta av teimum fimm deildunum verður intensiva deild við nýggjari bráðfeingis móttøku og skaðastovu tikin í nýtslu 4. oktober.

### Betri tænasta

Umstøðurnar á Landssjúkrahúsinum hava leingi verið ov trongar til at hýsa einum nútímans megin-sjúkrahúsi, og hetta hava sjúklingar og avvarðandi teirra stundum merkt.

Við nýggju umstøðunum fær sjúkrahúsið veitt sjúklingum eina munandi betri tænastu enn higartil hevur verið gjørligt. Greitt er tó, at enn er langt eftir á mál í arbeiðinum at nútímansgera umstøðurnar í gomlu bygningunum. Ein ætlan er løgd fyri hetta arbeiði, ið væntandi fer at taka 10-15 ár.

Fyrsti spakin fyri útbyggingini av Landssjúkrahúsinum varð settur í 15. september í 1998. Upprunaliga var ætlanin at taka nýbygningin í nýtslu tíðliga í ár, men farna løgtingsvalið í úrtíð seinkaði játtanini til keyp av útbúnaði nakrar mánaðir, og tískil mátti tíðarætlanin broytast.

### Nýhugsan og endurskoðan

Landssjúkrahúsið er sjúkrahúsið hjá øllum føroyingum og landsins størsta arbeiðspláss við yvir 600 ársverkum. Hóast hetta er Landssjúkrahúsið óvanliga lítið samanborið við megin-sjúkrahús aðrastaðni, ið aloftast eru nógv størri og hava eitt nógv størri sjúklingagrundarlag. Tí er neyðugt at hugsa nýtt og skipa arbeiðið á Landssjúkrahúsinum hareftir, um ein skynsamur rakstur skal vera gjørligur.

Hetta avspeglast í nýggja bygninginum, ið er innrættaður soleiðis at til ber at samantvinna virksemi, sum fyrr hevur ligið spjatt. Hetta seinasta árið hevur verið arbeitt við at leggja flytingina í nýggja bygningin til rættis, og í tí sambandi eru mannagongdir og arbeiðshættir endurskoðað. Málið við endurskoðanini hevur verið at skipa arbeiðið betur og harvið betra um tænastustøðið.

### Bóklingur um Landssjúkrahúsið

Í sambandi við at Landssjúkrahúsið fyllir 80 ár, samstundis nýbygningurin verður tikin í nýtslu, hevur sjúkrahúsið latið gera ein lítlan bókling. Í bóklinginum, sum telur 40 síður, verður ein partur av umfatandi søguni hjá Landssjúkrahúsinum søgd, eins og litið verður frameftir við greinum, har greitt verður frá um Landssjúkrahúsið sum er - og sum kemur. Bóklingurin er ætlaður starvsfólki, sjúklingum, viðskiftafólki og almenninginum sum kunning um Landssjúkrahúsið.

### Opið hús

Leygardagin 2. oktober, áðrenn hurðarnar í nýggju bráðfeingis móttøkuni og skaðastovuni lata upp fyri almennari nýtslu tveir dagar seinni, verður høvi hjá almenninginum at síggja nýggju umstøðurnar. Tá skipar Landssjúkrahúsið fyri opnum húsi við rundvísing í nýggja bygninginum, har starvsfólk fara at greiða frá virkseminum á ymsu deildunum.

Almenn móttøka verður í nýggja bygninginum fríggjadagin 1. oktober.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingardagsheilsa til Jens Jacob í Hjøllum á 80 ára degnum

Sunnudagin 22. august rundar ein kendur toftamaður tey áttati. Jakku í Hjøllum er sonur Ulrikku og Óla Olsen (í Hjøllum) á Toftum. Hann er giftur við Elsu av Skipanesi, og eiga tey 7 børn

Sum blaðungur fór hann til skips og sigldi millum annað undir krígnum til Bretlands við fiski. Seinni var hann í mong ár við Høganesi og kenda skiparanum Dia á Roykheyggi. Seinast í 1950-unum fór Jakku at arbeiða hjá D. P. Højgaard á Tofum. Meginpartin av tíðini arbeiddi hann sum formaður fyri garnareiðskapin hjá skipunum í góðu sildaárunum í 1960-unum. Seinast í 1960-unum fekk Jakku starv sum postmaður á Toftum og røkti hetta starv í 25 ár, tá ið hann fór frá fyri aldur.

Í frítíðini hevur Jakku havt mong ítriv, men mest av tíðini er brúkt í bátinum og til heimaseyðin. Sjálvt um árini eru blivin mong, so gongur hann nógv upp í heimaseyðin, og hann er framvegis fastur áskoðari til dystirnar hjá B68.

Jakku er kendur sum ein skilamaður bæði á sjógvi og landi. Hann hevur eitt lætt sinni og dugir væl at siga frá, og ofta kanst tú fáa eina sera skemtiliga toftasøgu frá honum.

Sum yngri luttók Jakku í kommunalpolitikki, og seinni var hann í mong ár í kirkjuráðnum, har hann var við, tá ið Fríðrikskirkjan varð bygd.

Altíð er hugnaligt at koma á gott hjá Elsu og Jakku í Hjøllum, har blíðskapurin er óførur.

Vit ynskja tygum hjartaliga tillukku við føðingardegnum við vón um Guðs ríku signing í komandi døgum. Vit gleða okkum til føðingardagshaldið á Svangaskarði sunnudagin 22. august kl. 17.

**Vinur**

## Bridgedeild Kaggans 30 ár

**Tann 17. juni fylti Bridgedeild Kaggans 30 ár. Felagið var stovnað á Dalavegi 1 í Havn í 1974**



*Í samband við 30 ára dagin varð henda myndin tikin. Á myndini síggjast nakrir av teimum góðu gomlu, sum frá vinstru eru: Pól Joensen, Helgi Joensen, Eyðun Jensen, Niels Nielsen, Salomon Johansen og Eyðun Joensen*

Frítíðarfelagið Kaggin varð stovnað 8. november 1969, og tá í tíðini var sjavs aðalkortspælið. Tað vóru tó tey, sum ynsktu at sleppa at royna okkurt meira spennandi. So tá Bambus og Poul Engberg byrjaðu at undirvísa í bridge í 1971 teknaðu 8 seg til. Fylgjandi árini fekk bridge góða undirtøku í Kagganum, og sum áhugin vaks, gjørdist greitt, at rætta loysnin var at stovna eina undirdeild. Helgi Joensen tók stig til stovnandi aðalfundin, og varð hesin hildin eitt summarkvøld í 1974. Bridgedeild Kaggans var frá byrjan við í toppinum í føroyskum bridge, men tað var ikki fyrr enn í 1978, at felagið vann sítt fyrsta FM-heiti. Síðani tá hevur felagið altíð verið við í toppinum.

Nú felagið fyllir 30 ár, sæst á limalistanum, at millum teir 44 limirnar eru fleiri, sum hava verið við síðan byrjan. M.a. stovnarin Helgi Joensen.

Í 1992 keyptu bridgefeløgini í Tórshavn gamla HB-húsið og bygdu tað um til eitt »korthús«. Tey 3 feløgini hava síðani spælt undir góðum umstøðum í Gundadali. Limatalið farnu árini hevur verið um 40, men pláss er altíð fyri fleiri. Farnu árini hevur áhugin fyri sjavs verið stórur, og vónast má, at onkur sjavsspælari fær brell fyri nýggjum avbjóðingum innan kortspæl. Bridgedeild Kaggans fer aftur í vetur at spæla bridge í bridgehúsinum mikukvøld kl. 19. Øll eru vælkomin!



*Bridgedeild Kaggans hevur vunnið enn eina kapping í sjeytiárunum. Frá vinstru Eyðun Jensen, Helgi Joensen, Niels Nielsen og Eyðun Joensen*

Fyri 25 árum síðan:

## Fyrsta danska kavbátavitjan í 50 ár

Danski kavbáturin Nordkaperen kom í august 1979 á tríggjar daga vitjan í Føroyum. Samstundis var hann fyrsti danski kavbáturin, sum hevði vitjað í Føroyum í 50 ár.

Nordkaperen sigldi alla leiðina úr Danmark til Føroya undir vatni. Hann kom ikki upp, fyrr enn hann kom inn á Nólsoyarfjørð.

Úr Føroyum gekk leiðin til Íslands.

Áðrenn farið varð avstað aftur, gjørdi Nordkaperen nakrar royndir í Nólsoyarfirði, har siglt varð bæði omaná og undir vatni. Síðan sigldi hann norður um Høgnaboða, har hann kavaði. Hann skuldi so ikki koma upp aftur, fyrr enn hann kom til Akureyrar.



*Nordkaperen við bryggju á Molanum í Havn í august 1979*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1979*

Strandfaraskip Landsins:

## Andrass Jensen nýggjur leiðari á Samferðsludeildini



Andrass Jensen verkfrøðingur í Havn er settur sum nýggjur leiðari á Samferðsludeildini hjá Strandfaraskipum Landsins. Átta umsóknir vóru til starvið.

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt vístu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara góði maður og pápi

**Nicodemus Hentze**
Sandur

varð tikin frá okkum.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Javna og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Elisabeth, Niels Jacob og Olaf**

**Tøkk**

Vit vilja á henda hátt siga takk fyri sýndan heiður, tá okkara kæra syskinabarn

**Marin Elisabeth Zachariasen**
Sandur, vanliga nevnd Marin á Sondum

doyði og varð jarðað, 73 ára gomul.

*Fyri tey avvarðandi*
**Halldóra**

## Dagurin

**20. august. Bernhard,** deyður í 1153. Abbati og kirkjutænari í Fraklandi. Kom upp í munka- og nunnuskipanina, ið róptu seg *cisterciensaraskipanin*. Har gjørdist hann skjótt oddamaðurin, og fekk stóran týdning í kirkjupolitikki og kirkjulæru í 12. øld. Hann bygdi í 1115 kleystrið Clairvaux og varð síðani róptur Bernhard úr Clairvaux. Hann var vanur at taka til: *Ora et labora* (bið og arbeið).

Navnið er germanskt og merkir *bjørn og harður*.